Gullvinnararnir frá Rhodos tiknir á bóli:

# Veðrakappingin hjá Sunda Byrsufelag 2007

**Hvørt ár um mánaðarskiftið september/oktobur letur FØROYA BJÓR ein veður til Sunda Byrsufelag at kappast um, og hendan kappingin er ein stórur dagur hjá skjúttunum, tí vinnarin fær veðrin til ognar.**

SKJÓTING
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*Meistarabólkurin; Frá vinstru: Lennart Akerblom, Marius Joensen og Bengt Lindgren.*

Leygardagin 29. septembur var tann árliga Veðrakappingin skotin á skjótibreytini hjá Sunda Byrsufelag norðan fyri Norðskála. Sunda Byrsufelag stóð fyri tiltakinum, men teir bjóðaðu systurfelagnum Byrsumúla við til kappingina, hóast Byrsumúli ikki enn hevur reguligar venjingar.

### Gullvinnarar luttóku

Í ár var serliga áhugavert at taka lut í kappingini, tí teir báðir álendingarnir, sum vunnu gull á oyggjaleikunum á Rhodos í summar, vóru við. Dagin fyri kappingina høvdu teir báðir harumframt frálæru, bæði fyri nýggjum og gomlum skjúttum, so tað vóru nógvir, sum fingu onkur góð ráð við sær heim tann dagin.

Veðrið var av tí allarfagrasta báðar dagarnar. Byrjað varð leygarmorgun kl. 9.30 í 4 bólkum:

Meistara-bólkur
A-bólkur
B-bólkur
C-bólkur

Sjálv kappingin bleiv eisini sera spennandi, jú longur leið út á dagin.

### Elitan

Tað var skjótt, at elitan legði seg á odda: Teir báðir álendingarnir, Marius Joensen, Magni Dam og Jóannis Joensen, og kappingin teirra millum var hørð til seinasta minutt.

Tá ið trý umfør voru skotin, var Bengt Olof Lindgren av Álandi fremstur við 69 dúgvum av 75, Lennart hevði 66, og Marius hevði 63. Tá ið 4. umfar varð skotið, gekk ikki so væl hjá Lennart á 4. platti, hvar hann misti 5 av 6 dúgvum, og Bengt Olof bleiv nokk paff av hesum, tí tá misti hann eisini fleiri. Marius sá ein kjans at nærkast vinnaranum og skjeyt eitt meistarligt umfar: 24 av 25 dúgvum. Men tað var ikki fyrren við tí allarseinastu dúgvuni, sum álendingurin Bengt Olof Lindgren misti, at tað gjørdist greitt, at Marius hevði vunnið kappingina. Hann og Bengt Olof stóðu líka í dúgvum, men av tí at Marius var bestur í seinasta umfari, vann hann kappingina.

Vinnari í A-bólkinum gjørdist Eirikur Elisson við 46 av 75 dúgvum, vinnarar í B-bólkinum Finn Ludvig við 33 av 75 dúgvum, og í byrjunarbólkinum Sigmund Petur Hansen við 27 av 75 dúgvum.

### Vinningurin

Aftaná kappingina varð farið eftir veðrinum, sum bleiv skotin og flettur. Veddað varð um vektina við at gjalda 20 kr. hvør. Tann sum gitti rætt, fekk puljuna. Og fyri at tað ikki skal vera lygn, vann Marius eisini veddingina (68 pund). Síðani varð veitsluhald í Eydnuni.

Tað er greitt, at vónirnar at gera seg galdandi á oyggjaleikunum, sum verða á Álandi í 2009, eru rættiliga góðar, nú gullvinnaranir frá leikunum á Rhodos í summar fóru heim aftur sunnumorgunin sum av torvheiðum.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

**Brennir tú fyri børnunum, sum bera brek?**

**Og kveikja vaksin við sama skerda førleika eisini ein loga í tær?**

So verður tú kanska ein av okkara eldsálum á Almannastovuni! Júst nú sóknast vit eftir einum socialráðgeva ella fólki við aðrari hóskandi útbúgving til Brekdeildina, ið ráðgevur vaksnum og børnum við skerdum førleika og familjum teirra. Starvið gevur tær møguleika at ávirka, samstarva breitt og arbeiða í ógvuliga spennandi umhvørvi.

Á Brekdeildini, sum er ein landsumfatandi serdeild á Almannastovuni, ráðgeva vit fólkum í øllum Føroyum. Vit á høvuðsdeildini arbeiða tætt saman við økisdeildunum uttan fyri Tórshavn. Brekdeildin samstarvar eisini við aðrar stovnar, sum veita fólki við breki tænastur; t.d. Sernámsdepilin, Serforsorgina, skúlar og ansingarstovnar. Starvið hevur við sær innihaldsríkt arbeiði ymsastaðni í landinum.

**Ráðgevarar á Brekdeildini**
- ráðgeva vaksnum við breki
- ráðgeva familjum hjá børnum við breki
- skipað samstarv við aðrar fakbólkar
- hava hóskandi útbúgving og arbeiðsevni
- hava nógva vitan um almannaverkið
- eru førir fyri at seta fyriskipanir í verk
- kunnu orða seg væl munnliga og skrivliga
- hava góðan kunnleika til EDV.

**Løn**
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

**Almannastovan**
Kundi tú hugsa tær nágreiniligari upplýsingar, ert tú vælkomin at venda tær til Súsonnu Holm, deildarleiðara. Hon hevur telefonnummar 353510.

Umsóknir við prógvum og viðmælum kunnu sendast Almannastovuni, Smyrilsvegi 20, postsmogu 3096, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 30.10.07

KREA.FO

# Minst silvur er í væntu í Grønlandi

**Tað føroyska badmintonlandsliðið hevur megnað at spæla seg til semifinaluna eftir at hava vunnið móti Isle of Man og Gibraltar.**

BADMINTON
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Tað bleiv ein góður byrjunardagur hjá føroyska landsliðnum á Islands Badminton Event 2007 í Grønlandi. Við 3-2 sigri móti Isle of Man, kundu føroyingarnir skúgva til viks tað pressið, ið tey sjálvboðið høvdu lagt á seg sjálvi áðrenn kappingina.

- Áðrenn høvdu vit eina hóming av, at Isle of Man var tað sterkasta liðið í bólkinum, og rætt var. Vit blivu pressaði út í ein síðsta og avgerandi dyst, fortelur føroyski landsliðsvenjarin Tobias Effersøe. Hann heldur á fram og fortelur at tá støðan var 2-2, skuldi Sigrun Smith og Aksel Poulsen spæla mix-double, fyri at avgera dystin til okkara fyrimun. Sjálvt um byrjanin var heldur trilvandi, vunnu vit tó ein tryggan sigur, við siffrunum 21-13 og 21-14.

### Tættir dystir

Landsdysturin beyð annars uppá tveir tættir dystir. Tann eini fall í okkara lut, men hin seinni var til fyrimuns fyri mótstøðumennirnar av Isle of Man.

Harra-double parið, ið var mannað av Aksel Poulsen og Flóvin Mikkelsen vunnu í einum heldur rótutum dysti, við siffrunum 21-15, 18-21 og 21-19, meðan vit tíverri taptu damu-singluna við Guri Poulsen, somuleiðis í trimum tøttum settum við siffrunum 18-21, 21-18 og 17-21.

### Lættari dystur

Gibraltar voldu okkum ikki somu trupuleikar, sum Isle of Man gjørdi. Vit vunnu allir fimm dystirnar móti Gibraltar, og uttan at geva eitt einasta sett í nøkrum av dystunum. Liðið var mannað við somu leikarunum, men at síggja til var tað sum hamskift. Var fyrsti dysturin merktur av spenningi og ivasemi, var seinni dysturin sera róligur og frígjørdur. Spælararnir vórðu djarvari og tordu at spæla sítt egna spæl.

### Hálvfinalan

Í hálvfinaluni bíða Gotland, sum í hinum bólkinum í kappingini, vann móti Falklandsoyggjunum, men taptu móti favorittunum úr Grønlandi. Hálvfinalan verður væntandi ein tættur dystur. Tey vænta úr føroyska ferðalagnum, at tað fellur til okkara fyrimun. Og tað hóast okkara besti harra-single spælari, Niclas Eysturoy, situr fastur í Íslandi vegna trupuleikar við flogfarinum.

### Fastur í Íslandi

Niclas hevur verið á venjingarlegu, í Bulgaria, dagarnir frammanundan Grønlandsferðini, og skuldi væntandi bert missa tann eina dagin í Grønlandi, men soleiðis skuldi ikki vera. Hendan legan, talan var um, er liður í úttøku til Olympisku Leikirnir í 20012.

Hvussu er og ikki, so hava føroysku badminton íðkararnir víst ein góðan profil á hesum leikunum, og megna tey at koma framvið Gotlandi í hálvfinaluni, so er finalupláss triggjað, ið eftir øllum at døma fer at vera móti vertunum úr Grønlandi.